# Gandaorð hjá Johan eru tátur

JOHN JOHANNESSEN
Løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin



**Privatisering. Hetta hevur verið stóra gandaorðið og loysnin uppá allar samfelagsligar trupulleikar hjá super liberalistiska vonginum hjá Johan Dahl í Sambandsflokkinum. Men nú nakrir gamlir almennir lastbilar eru seldir, gremja liberalistarnir seg um lækkað tænastustøði og biðja landið taka um endan aftur. Lítil dugur var í gandaorðinum**

Privatisera! Einskil! Sel og lækka skattin! Við hesum rakstrarrópum hava ídnastu høgrakreftirnar í samgonguni rópt oyruni full á javnaðarfólkum, líka síðani vit í januar 2004 settu okkum kring borðið at skipa eina samgongu.

Loysnin upp á allar samfelagstrupulleikar hevur fyri hesar somu kreftir verið júst sami gandasetningurin: Privatisera! Einskil! Sel og lækka skattin! Johan Dahl og aðrir sokallaðir super liberalistar ytst á høgravonginum hava í øllum samfelagsmálum prædikað somu loysnina. Nevniliga, at tænastuveitingar mugu ikki verða veittar av tí almenna. Grundgevingin hevur verið, at privata initiativið dugir betur at veita eina enn betri tænastu fyri minni penga, enn tað almenna. Og júst við hesi somu grundgeving var tað, at ein samgongumaður nú ein dagin byrjaði at tutla í krókunum í tinghúsinum, um at lata Smyril og suðuroyarleiðina upp í hendurnar á privatum at reka.

### Varislig byrjan

Nú er tað soleiðis, at vit í Javnaðarflokkinum eru tolin fólk, sum geva okkum stundir at lurta eftir og viðgera hugskot hjá øðrum. Vit eru heldur ikki betong kommunistar. Og tí eru vit vanliga til at tosa við, tá tað kemur til at fremja liberalistiskar broytingar innan fyri eitt rímiligt mark.

Fyri nøkur hevur tað alt samgonguskeiðið verið av alstórum týdningi at sleppa at selja eina ella aðra almenna fyritøku. Kanska mest fyri at pussa ideologisku gloriuna, men eisini fyri at royna at prógva mergin í hesum fantastiska gandaorðinum: Einskiljing!

Tá fyrsta uppskotið var at selja nakrar gamlar, bláar almennar lastbilar, hildu vit í Javnaðarflokkinum, at hetta var helst tann mest varisliga loysnin, ið hugsast kundi í sokallaðu einskiljingartilgongdini. Tí tóku vit undir við tí, og vit trúðu satt at siga eitt sindur uppá hetta lítla gandakynstrið, sum Johan Dahl og aðrir góðir liberalistar drógu upp úr hattinum.

### Bara orð

Men nú tykist tað, sum at hesi trý: Privatisera! Einskil! Sel og lække skattin! bara eru vanlig orð uttan nakran sum helst farra av magiskari megi. Í øllum førum, um vit skulu trúgva Johan Dahl.

Tí nú trínur ein av fremstu forspríkarunum fyri hesum trimum forkølaðu gandaorðunum fram á pallin og vil hava tað almenna at taka hesar stakkals gomlu, bláu lastbilar til sín aftur.

Tað hevur víst seg fyri Johan Dahl, at hann ikki fær vinnuvirksemi sítt í Vági at hanga saman, uttan at tað almenna flytur fisk fyri hann ímillum Kollafjørð og Havnina. Í Suðuroynni og ímillum Suðuroynna og Havnina tekur tað almenna sær framvegis av vøruflutninginum, tí hesar leiðir vóru ikki við, tá Farmaleiðir fóru á privatar hendur.

Sjálvandi er tað harmiligt, at sølan av Farmaleiðum forðar fyri vinnuvirksemi úti um landið. Men skemtiligt er tað, at ídnastu talsmenninir fyri privatisering heldur ynskja sær almennar tænastur, tá teir sjálvir hava brúk fyri góðari og bíligari tænastu.

Og enn skemtiligari er tað, at ídnasti talsmaðurin fyri júst søluni av lastbilunum, nú vil hava skattaborgaran aftur í førarasetrið.

### Er gandamegin uppi?

Eftir stendur, at vit dugdu ikki at selja 15 gamlar, bláar lastbilar, sum vit fingu 4 milliónir krónur fyri. Spurningurin nú er, um nøkur magisk megi framvegis er í hesum trimum gandasetningunum: Einskiljing! Privatisering! Sel og lække skattin!

Tá fremstu liberalistarnir ynskja 15 lastbilar aftur undir landsins veingjabreiði, hvussu verður tá við sølu av til dømis Atlantsflogi ella Føroya Banka?

Vit í Javnaðarflokkinum skulu gera okkara besta, fyri at hesar sølur fara skynsamliga fram og tæna breiðu fjøldini av fólki best – um tær vera veruleiki.

Men í øllum førum hava vit fingið staðfest, at lítil máttur er í gandaorðunum hjá Johan og co.

www.john fo

# Heilsan frá Levi Joensen til Sjómannadagin




*Malta, Hirtshals 08-08-2006*

Lag: Av øllum teim snekkjum

Mítt hjarta, tað heitt fyri sjómonnum slær,
teir stuðlar so sterkir her standa.
Av havinum inn mangan stertin hann bar,
tó skútan, hon rann djúpt í vanda.

Men gleðin var stór, tá ið avreitt her var,
nú leiðin til hús, heim hann gongur.
Her børnini gleðast, og hjarta lætt slær,
í stovuni skjótt ljóðar songur.

Almátti Gud, Hann her heimið væl sær,
tá bønin mót Himlinum stígur.
Í tøkk fyri dagin, sum eydnaður var,
Guds barnið til kníggja her nígur.

Nú hvílir Guds friður í lonini trygt,
tó aftur til verka skal farast.
Ja, havsbylgjan ikki á stabbar er bygd,
tí má hvør ein íða her lærast.

Tað størsta av øllum, sum lærast her kann,
er Frelsaran sjálvan at kenna,
sum stríddi á krossi og sigurin vann,
tá blóð Hans har strítt mátti renna.

Billettin til Himmalin goldin nú er
til hvønn tann, ið hana vil taka.
Í trúnni hon trygt teg til heimlandið ber.
Tú mást ei tann kjansin her vraka.

**Levi Joensen**

# Meira saft og kraft? Ella: hvat bagir Sosialinum?

ROLF GUTTESEN



Theodor Olsen er blaðmaður á Sosialinum, og hevði í gjár eina samtalu við Anju Andreassen, um nýggju bókina hon hevur skrivað um Sambandsflokkin.

Men í sjálvari yvirskriftini voldtekur hann grovliga sakina og heldur tað vera passligt at seta sum yvirskrift: »Tað hevði kanska verið meira saft og kraft í at skriva um Jóannes Patursson«. Jamen, hvat er meiningin? Hatta hevur einki við evnið ella bókina um Sambandsflokkin at gera. Hatta er ovurgrovt og púra misvísandi!

Hvussu letur redaktiónin á Sosialinum eina slíka grovheit sleppa ígjøgnum? Hatta líkist bara ongum!

Samrøðan er sjálvandi um nýggju bókina (sum eg enn ikki havi lisið) um Sambandsflokkin. Tí er tað mær ein gáta, hvussu ein blaðmaður finnur upp á at skriva nakað um Jóannes Patursson, ovast og í fyrstu reglu. Har manglar bæði sansur fyri proportiónum og realitetum.

### Saft og kraft í hvørjum?

Jóannes Patursson er eftirhondini eitt halgimenni, sum mestsum verður tilbiðin av mongum. Tíverri er eingin søgumaður, mær vitandi, sum hevur sett handan reaktionera bóndan upp á pláss. Hann var ein miðaldarleivd. Í 1930'unum var hann nazi-vinur.

Hann dró norskar nazistar til Føroya at agitera móti Danmark og fyri Anschluss til Noreg. Hann ferðaðist í Norra, helt jammurligar røður um, hvussu Danmark píndi føroyingar. Harmuligt. Paturson skrivaði ofta í norskum bløðum og tíðarritum. Eitt nú í fascistvinarliga "Norsk Årbog".

### Nazi-vinirnir

Tak til dømis árgang 1935. Har skrivar JP um stríðið um jørðina í Føroyum. »striden og jordi på Færøyane«. Innihaldið í greinini skal ikki kommenterast her, men tankagongdin virkar púra forskrúvað í dag.

Næsta grein er skrivað av einum norskum geologi, Adolf Hoel nevndur. Hann skrivar um norska ekspansiónismu á Svalbardleiðunum. Norðmenn minnast Hoel sum mannin, ið Quisling setti sum rektara á Oslo Universitet tá landið varð hersett at Nazitýsklandi og norskir nazistar vóru settir at stýra landinum. Sami Adolf Hoel var í 1945 dømdur sum landasvíkjari.

Triðja greinin er "Mussolini og Hitler"

Fjórða greinin "Nedervning", um um arvalæruna.

Hetta er sanniliga eitt fínt selskap. Men JP var sanniliga ikki einsamallur, hvørki tá ella seinni.

### Ikki meira um hasa søguna

Hetta skal ikki blíva nøkur ritgerð um konservativa bóndan í Kirkjubø. Eg vil bara siga, at Sosialurin átti at hugsa seg um í valinum av yvirskrivt.

Ríkiligt svass er skrivað um nationalismuna í Føroyum. Eg gleði meg til at lesa bókina hjá Anju.

Saft og kraft í Patursson? Hann var eitt umvandrandi, miðaldarligt fossil.

## Hetta var eingin grovheit, Rolf

EIRIKUR LINDENSKOV
blaðstjóri

Rolf Guttesen spyr í greinini omanfyri, hvat bagir Sosialinum, tá hann nevnir Jóannes Patursson í yvirskrivtini í grein um bókina um søguna hjá Sambandsflokkinum, sum kemur út í morgin.

Fyri ein ordans skyld skal sigast, at Anja Andreassen sjálv valdi orðini um Jóannes Patursson, og at vit á redaktiónini hildu júst hesi orð lýsa sakina sambært henni: at tað eru tey sjálvstýrishugaðu, sum hava myndað føroyska søguskriving, at tey einsini vóru droymarar, meðan tað vóru sambandsmenninir, sum vóru teir »skikkiligu« realpolitikararnir